# Tíðarinnar tonn tók takið



**BIKIÐ**

*Jóan Magnus Skoradal »kokkast«:
– Bikið er so nógv lættari at smyrja, tá tað er hitað upp eitt sindur, sigur hann*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**GLYVRAR** – Nei, eg standi ikki og kokkist, sum tað kanska sær út til. Eg hiti faktiskt bara bikið upp, so tað er lættari at smyrja takið, sigur Jóan Magnus Skoradal, sum arbeiðir hjá AP Handverk.

Snorri Brend

Hetta er ein mikudagur, og veðrið er avgjørt til uttandura arbeiði her við kirkjuna á Glyvrum.

Uppi í eini lyft stendur Allan og riggar til at leggja bikið á takið. Og niðri undir honum stendur Jóan Magnus og rør í eini grýtu.

Teir báðir – arbeiðsgevarin Allan Poulsen og arbeiðsmaðurin Jóan Magnus Skoradal - hava fingið eina ávísa uppgávu at loysa. Ella rættari: Tvinnar.

Upprunaliga skuldu teir báðir hjá AP Handverk einans reinsa takið, vaska tað og at enda mála tað. Men tá til stykkis kom, mátti eitt sagnorð knýtast aftrat arbeiðinum: At umvæla.

Takið var so mikið illa farið, at neyðugt var at geva tí eina eyka hond.

– Annars var vandi fyri, at enn størri skaði kundi hent, sigur Jóan Magnus Skoradal, sum inntil fyri kortum sigldi sum meistari við rækjuskipinum Fríðborg.

Hann hevur ikki fingið annan kjans enn, og arbeiðir tí í løtuni hjá AP Handverk, sum hevur heimstað sín í Saltangará.

## » Vit royndu at smyrja tað uppá beint frá blikkinum, men tað gekk so ræðiligt av tí tá, so tað góvust vit við aftur




**KAMBAR**

*Fyrst var ætlanin bert at reinsa takið, men seinni vísti tað seg at vera neyðugt eisini at umvæla tað. Her er Allan Poulsen í lyftini og í ferð við at umvæla ein av kambunum á kirkjutakinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Takbik

Glyvra kirkja varð í síni tíð vígd í 1927, og endurvígd í 1981 eftir eina munandi útbygging.

Men tíðarinnar tonn slítur eisini á bygningin uttan, og nú var komið hartil, at takið mátti umvælast og reinsast. Serliga nógvur gróður var á teimum sunnaru síðunum.

– Vit hava nú vaskað tað, og síðani skal tað umvælast. Her er serliga talan um kambarnar, sum eru illa farnir, greiðir Jóan Magnus frá.

Hetta er bert fyrri partur av uppgávuni, tí annar parturin er at forða fyri, at slíkt hendir aftur í bræði. Nú skal nevniliga bikið bræðast.

– Ja, so snøgga vit takið aftur, og smyrja síðani takkit ella takbik av slagnum Icopal á aftur.

### Hita upp

Hóast kirkjan hevur síni ár á baki og takið hevur uppliva tær fýra árstíðirnar mangar ferðir, hevur talan kortini ikki verið um nakran leka í hesum umfarinum.

– Nei, tað hevur ikki likið, men tað er nokk meiri tað, at gróðurin er farin so illa við takinum - uttan at nakað er gjørt við júst tað, vísir Jóan Magnus á.

Til tess at bøta um og forða fyri endurtøku, hava teir báðir – Jóan Magnus og Allan – lagt ein dúk við glastrevjum á og síðani máling ella bik omaná.

Sum við øllum øðrum biki, er best um tað er hitað upp eitt sindur, og ikki kalt.

– Ja, vit royndu at smyrja tað uppá beint frá blikkinum, men tað gekk so ræðiligt av tí tá, so tað góvust vit við aftur.

– Vit valdu ístaðin bara at hita tað, og so brúkar man jú tað minni, slær hann fast.

snorri@sosialurin.fo